# Víkingaaldargrøv í Tjørnuvík.

*Eftir Sverra Dahl og Jóannes Rasmussen.*

*Inngangur.*

Fyrstu víkingagrøvina í Føroyum kom ein smádrongur fram á — ikki í einari av bygdunum nevndar eru í Føroyingasøgu, men í lítlari, fjarskotnari, illa atkomuligari bygd, har ongar sagnir siga frá fornari búseting — *í Tjørnuvík.* Hetta gekk soleiðis til. Ein dagin í apríl 1955 spældu smádreingir, sum so ofta fyrr, í einum sandeyga uttanfyri bøgarðin har menn o. u. 1930 gjørdu veg til Víkar. Dreingirnir bygdu sær «rekahús» t. e. smáar grótgirðingar at goyma í sprek o. a. teir finna á sandinum. Nú ein teirra, tann 11 ára gamli *Hans Esbern Heinesen* tekur stein úr beninum, sær hann á bein innanfyri; leggur hetta í stundini inn aftur og fer heim at siga faðir sínum *Jacob Heinesen* frá. Hesin fer sum vera man at vita, hvat ið tað er, sonurin er vorðin varur við, heldur tað vera mannabein og laðar tí væl upp fyri.

Sama heystið, tá *Leif Dahl,* lækni á Eiði, er í bygdini, taka teir beinini út aftur. Læknin ásannar at hetta eru mannabein og biður Heinesen um at boða *Fornminnissavninum* frá.

Á sumri aftur verður staðið rannsakað við tí úrsliti, at vit tann 25.5. 1956 fingu fram fyrstu vissu víkingagrøv og í hond fyrsta vissa víkingaaldargripin, ið higartil er funnin sum gravfæ í Føroyum.

*Lendið.*

Tjørnuvík er norðasta bygdin á Streymoynni. Tjørnuvík er brimpláss, landnyrðingur norðan stendur beint inn á víkina. Innast í víkini er fjøruslætt, møl og sandur. Bygdin liggur vestantil við víkina, uttan um bygdina er slættur



1. mynd. Lendið «yviri í Trøð» sæð norðan.
(The site north).

bøur. Allastaðni suður av bygdini og út við víkararmarnar er bratt uppfyri, suður- og vestureftir gongur bøurin heilt niðan undir hamrarnar. Vegur gongur út á lendingina vestan-til á víkini og eystureftir gongur ein vegastubbi eftir tí gomlu gøtuni til Víkar. Lendið eystanfyri bøgarðin nevna teir «yviri í Trøð». Millum bøgarðin og Rættá, ið er fyrsta áin eystur-eftir frá bøgarðinum, gongur ein vallaður ryggur oman móti vegnum. Hann gongur javnt niður eystur móti Rættá og vestur móti garðinum har hann er ájavnur við vegin. Millum bøgarðin og ánna eru 37 m; hægstur er ryggurin

12 m vestanfyri ánna. Ryggurin gongur niðan undir ein lítlan hamara beint undir tí nýggja teigalendinum, hetta er 14—15 m omanfyri vegin. Grefsturin, sum umrøddur er í hesari grein, er 7 m eystur frá bøgarðinum, beint innan fyri vegin, ið er 8 m upp frá sjónum.

*Gjøgnumskurður.*

Á 2. og 3. mynd sæst ein skurður, sum gjørdur varð gjøgnum grefsturin «yviri í Trøð», hann gongur úr land=synningi eystri í útnyrðing vestan. Bæði á strikumyndini og á ljósmyndini sæst at skilt verður ímillum 3 fláir sum ymiskar eru til útsjóndar og tilfar: A, B, C. Eystantil á skurðinum er niðurmarkið á C (niðasta flógvin) 8,53 m o. sj., niðurmarkið á B (miðflógvin) 8,75 o. sj. og niður=markið á A (ovasta flógvin) 9,29 m o. sj. Svørðurin er 10,35 m o. sj. og skurðhæddin tí 1,82 m. Markið millum hesar 3 fláirnar er ikki bein linja og heldur ikki er tað heilt hvasst.

*Flógvin A* er hin áðurnevndi omanruddi ryggurin. Til=farið í honum er vanligt omanrutt tilfar: grót, eyrur og leir hvørt um annað, tað skilir seg ikki á nakran hátt frá til=farinum í tílíkum ryggjum aðrar staðir í landinum.

*Flógvin B* er toluliga reinur sandur. Bera vit hann saman við sjósandin í fjøruni, er hann átøkur honum, men kortini eitt sindur brúnligari á liti og undir sjóneyku sæst skill=iga, at hann er meira tærdur og slitin.

*Flógvin C* er sandur av sama uppruna sum sandurin í flónni B, men hann er feitari í hondini og uppaftur brún=ari á liti. Gulbrúnar skeinur ganga ígjøgnum hann. Undir sjóneykuni er munandi meira óreinska at síggja enn í sand=inum í ovaru flónni.

Tað er ikki at ivast í, at sandurin í báðum teimum niðaru fláunum er foksandur. Tá niðara sandflógvin kortini er feitari og brúnari á liti, so man atvoldin til hetta vera, at leir og ymisk lívrunnin evni eru skolað niðureftir við



3. mynd. Tvørskurður: útn. vestan–lands. eystan.
(Section y-y: VNV–ESE).

avfallinum. Hvønn uppruna tær gulbrúnu skeinurnar hava er ikki lætt at siga nakað um við vissu, men líkt kundi verið til at hetta er lívrunnar leivdir úr grøvini, ið burturskolaðar eru.

Tað lendið, sum grøvin í sínari tíð er grivin niður í, hevur tí ivaleyst verið ein sandoyri ella mølheygar, ið har hava ligið. Á 2. og 3. mynd sæst at miðflógvin (B) einans er órógvað har grøvin er og at flógvin omaná er órørd; hon man tí vera omanrudd seinri. Tað, at steinarnir, sum grøvin er laðað av, vóru inndottnir og tað, at beinini vóru so illa farin, miðar eisini ímóti at sandfláirnar hava verið opið lendi rúma tíð aftaná at grøvin var grivin. Hevði hetta omanruddað tilfarið verið komið stutt aftaná at grøvin var grivin vildi leivdirnar ivaleyst verið nógv betur vardar. Tey beinini, ið frægast vóru varðveitt lógu øll undir inndottnum hellum, og hava tí verið betur vard móti luft og vatni.

### *Útgrefsturin.*

Grivið varð frá beninum — inn suður — 2 m uttan um tað leysa grótið í skurðinum (2. mynd). Tá ið hin omanrudda flógvin (A) var grivin oman av, kom sandurin í flógv B undan. Hann var her í støðum leysari og óreinari enn báðumegin við í skurðinum. Her og har komu steinar undan; nú reinsað varð, kom fram óregluliga samanblakað grótrúgva, men tá ið gjøllari varð hugt eftir, sást, at meginparturin var valt grót: yvirhøvur 0,45—0,55 m langar, 0,20—0,25 m breiðar hellur. Bara vestast lógu 2 malargrótsteinar: 0,55 m langir, o. u. 0,20 m breiðir.

Tað var beinan vegin skilligt, at her hevði fyrr verið grivið, og at hesir steinar vóru drignir saman við serligari ætlan. Hetta royndist eisini so, tá ið teir vórðu tiknir upp. Undir teimum aftur stóðu aðrar hellur eftir kanti — serliga tvær, ið báðar stóðu hallar út á. Um tær upprunaliga eru settar so ella eru útdottnar, ber ikki til at siga, nú alt hitt grótið var so samandottið. Men greitt sást, at her

hevði verið gjørd grøv við toluliga ferhyrndari umgerð av kantsettum hellum. Bara fyri vestara endan var lagt langt og mjátt malargrót, trúliga í fullari gravarbreidd.

Ivasamt er, um summar av hellunum hava ligið oman á umgerðini sum lok; helst ikki, tí eingi bein vóru at finna




4. mynd. Flatatekning av grøvini. Nr. 1, flís av knæsbótaleggi; 2 og 3, leivdir av fótunum; 4, skølturin; 5, ringprónurin. (Plan of the grave. 1, fragment of fibula; 2 and 3, remains of feet; 4, cranium; 5, ring-headed pin).

í miðjuni á grøvini, men bara undir inndottnum hellum, soleiðis sum frásagt er. Tað er tí ein spurningur, um vit ikki mega tala um grøv við grótumgerð heldur enn um regluliga steinkistu.

Beinini, pilturin fann, vóru inn aftur stungin og lógu nú

í lítlari rúgvu. Tey eru: *høgri lærleggur, brot av vinstra lærleggi, brot av høgra langleggi.*

Høgri lærleggur var eisini brotin, men øll brotini eru til og vísa, 39,5 cm langan heldur klæntrasligan legg.

*J. Balslev Jørgensen, dr. med.*, hevur gjørt okkum tann beina at kanna lærleggin og sigur hann, at leggurin er av tilkomnari konu, sum hevur verið 155 cm høg.

Uttanfyri grøvina lá 7,9 cm long flís av øðrum *knæsbótaleggínum* (4. mynd nr. 1). Undir tí fyrr nevnda malargrótinum fyri vestara enda lógu fúnaðar leivdir av *hælbeini* og *liðendar*, helst av *øklunum* (4. mynd nr. 2). Beinleivdir vóru eisini at hóma undir næsta steini, men einki sást skilliga, av tí at tær beinan vegin vórðu dust; hetta man vera hin fóturin (4. mynd nr. 3).

Farvegur av viði var ongar staðir at síggja, heldur ikki av beinum fyrr enn undir eystasta steini. Har (4. mynd nr. 4), lógu fúnaðar leivdir av *skøltinum*, sum tað eydnaðist at fáa upp allar, við at herða tær so hvørt sum tær vórðu penslaðar fram (5. mynd).

Niður eystur frá steininum omaná skøltinum lá, innvavd í plantutægrir, lítil *beinmolarúgva* saman við *rustklumpi*, sum einki sigst um. Beinmolarnar hevur steinurin brotið av skøltinum og haft við sær, tá ið hann bóltaði.

Gjøllari rannsókn á Fornminnissavninum*) hevur prógvað, at allar *tenn*, uttan aftasti høgri jaxlur í ovara munni, eru ella hava verið til, og at tær allar tykjast at vera frískar, men nógv slitnar.

Undir bollanum vóru skilligar aldutar rukkur av einumhvørjum, sum nú var heilt fúnað burtur.

Í beninum (2. mynd) sæst, at teir hava grivið djúpari í vestara enda enn í eystara; hetta kann vera gjørt við vilja fyri at høvdið skuldi liggja hægst.

Longdin á líkinum í leguni er — 1,35 m og tað vendir í *landnyrðingeystan—útsynningvestan.*

*) *H. D. Joensen*, landslækna og *Magnus Jensen*, tannalækna, ið hava kannað bein og tenn, veita vit tøkk.

Høvdið liggur í landnyrðingsendanum og á vinstra vanga við nakkanum út móti sjónum og andlitinum inn móti landi, suðureftir. Líkið hevur tí helst ligið á vinstru lið.

Eftir hesum kann so dánt metast um mát á sjálvari grøvini; malargrótið niðri við fótalagið má vera gliðið inn oman



Foto: Svend Poulsen.

5. mynd. Skølturin órørdur sum hann varð funnin.
(Cranium in situ).

á føturnar, og grøvin hevur tí við vissu verið nakað longur enn beinleivdirnar í legu vísa; í minsta lagi 1,5 m long, o. u. 0,5 m breið, innan.

Botnurin á grøvini er millum + 8,50 og + 8,70 m o. sjó., ovasti sandur her á staðnum + 9,20 – + 9,25 m o. sjó. Teir hava tí grivið o. u. 0,60 m – 0,70 m niður í oyrina – nakað er sandur og grót sigið saman – men ikki ber til at siga, hvussu djúpt yvirtromin á grøvini hevur

verið undir, av tí at grótið sum nevnt var inndottið. Eftir øllum líkindum hevur heygur neyvan verið gjørdur yvir grøvina.

Stutt frá skøltinum – 10 cm á skák niður og frameftir – lá einasti gripurin, ið henda menniskja hevði fingið við sær (4. mynd nr. 5).

Tað var ein *ringprónur úr bronsu,* sum sat í lítlum *klædnalepa,* ov lítlum til at vit fyribils tora at siga meira enn, at leivd er av einumhvørjum plaggi, líkið varð lagt í.

Sovorðnir ringprónar vórðu í forðum havdir at halda skikkjuni saman framman á bringuni, nakað soleiðis sum tey seinri í tíðini høvdu prón í sjáli.

Ringprónur okkara lá um herða- ella bringuleiðina, og klædnalepin sigur greidliga frá, til hvørs hann var nýttur. Hann er 150 mm langur allur og sum myndin (6. mynd) vísir endar nálin í høvdi ella knøtti við ringi í. Nálin er rund; ovast 4,2 mm tjúkk og mjækkast líðandi niður móti oddinum.

Høvdið, 7 mm høgt, 6 mm breitt, er evnað sum terningur við sneiddum hornum og fløtum síðum; inn í framsíðina er grivin sermerktur tvíknútur, vanliga nevndur: valknútur; sama myndin hómast eisini á baksíðuni, men er her næstan eird burtur. Eitt sindur oman frá høvdinum er lítil, lág klingra um nálina og undir henni innskorið sniðband. (7. mynd).

Ringurin er rundur, 4 mm tjúkkur og 18 mm víður uttan; niðast er 1 mm tjúkkur tráður lagdur í bregd.

Hetta man vera sjáldsamt, vit hava ikki uppspurt nakað samdømi og kunna einki siga um, hvat hesin tráður hevur verið til. (8. mynd).

Hetta er einfaldur, men vakur og sjáldsamur skartgripur.

## *Úrslit.*

Við tað at hetta er fyrsta ferð forn grøv við gravfæ er funnin í Føroyum, eiga vit einki sammetingartilfar sjálvir;

gravirnar í Syðrugøtu[5]) høvdu steinumgerð, men har var einki gravfæ og har sigst einki um aldur. Vit mega tí bera saman við royndir úr hinum Norðurlondunum.

Vanligasti grefstrarsiður í víkingaøld – her verður ikki talað um gravheyggjarnar – er at grava o. u. mannslanga, mjáa og grunna grøv niður í jørðina. Viðhvørt verður trækista nýtt, við hvørt ikki; stundum er gjørd umgerð av gróti, stundum bara grótrúgva laðað ella grýtt saman.

Um grefstrarsiðin í Orknoyum-Hetlandi tekur *Shetelig*[9]) soleiðis til: Gravene er lagt temmelig grunt, i naturlige sandbanker, skjelettet gjerne orientert med hodet mot nord, ofte mellom to rekker av stein, eller i en åpen ramme av store stein; en form som må være en nydannelse i gravskikken her vestpå ... men praktisk talt ukjent i Norge. Nakað sama orðalag nýtir *Brögger*[2]) í bók síni um norsku búsetingina í Hetlandi-Orknoyum.

Tær grefstrarumstøður, teir siga frá, eru meinlíkar teimum í Tjørnuvík, men grøvin í Tjørnuvík vísir



6. mynd. Ringprónurin.
(Ring-headed pin of bronze).

Foto: Niels Elswing. 1 : 1

eisini á grefstrarsið í Noregi við tað at høvdið í vesturnorskum víkingaaldargrøvum oftast vendir í ein norðan[10]). Í donskum[4, 7]) og svenskum víkingaaldargrøvum afturímóti, horvir høvdið vanliga í vesturættirnar; og er hetta helst ávirkað av kristnum gravsiði.

Í *Íslandi*[6]) er grefstrarsiður yvirhøvur hesin: Gerð hefur verið grunn grøf á haugstæðinu, oftast um 50 sm djúp,



Foto: Niels Elswing. 2 : 1

7. mynd. Ovari partur av próninum.
(Upper part of ring-headed pin).

óregluleg eða nokkurn veginn reglulega ferhyrnd, en ekki stærri en það, að líkið kæmist þar fyrir í þeim skorðum, sem því voru fyrirhugaðar. Þegar líkinu hafði verið komið fyrir í grøfinni, var steinum oft raðað kring um það og að nokkru leyti ofan á það og mold síðan mokað að. Þó var mold stundum mokað að líkinu, en grótlag sett þar á ofan, stundum var jafnvel ekkert grót . . . hlaðnar steinþrær (steinkistur) séu ekki með øllu óþekktar . . . en sjaldgæfar.

Líkið liggur á rygginum ella á høgru lið, bara í einum dømi á vinstru; høvdið vendir í ymsar ættir, eingin føst

regla tykist vera, men vanligast í ein sunnan ella vestan. Av 78 vissum dømum, sum *Eldjárn*[6]) viðger, vendir høvdið í 14 førum í útsynning, men bara í *einum* í landnyrðing — tó kemur nakrar ferðir fyri, at høvdið vendir norður, ella eystur.

*Grøvin í Tjørnuvík er tí uttan iva víkingaaldargrøv. Grefstrarsiðurin er mest líkur norskum siði, men grøvin sjálv næst*



2 : 1

8. mynd. Ovari partur av prónínum við bregdaða tráðnum í ringinum.
(Upper part of ring-headed pin, with braided thread fixed to the ring).

*skyld norrønum víkingagrøvum í grannaoyggjum okkara sunnanfyri Føroyar.*

Ringprónar vóru í víkingaøld vanligir í øllum Norðurlondum og, sum gravfundir vísa, nýttir bæði av kvinnum og monnum.

Hvørki hjá *Jan Petersen*[8]), sum viðger 310 norskar prónar av ymsum slagi, ella hjá øðrum høvundum har prónar á meginlandinum vera umrøddir, eru prónar sum okkara at finna.

Vestan hav vita vit nú um 31 tilsamans: 8 í Suðuroyum[2]),

2 á Katanesi-Sutherland, 5 í Orknoyum-Hetlandi, 15 í Íslandi*) og nú 1 í Føroyum.

Eisini í Íslandi eru ringprónar bæði í kvinnu- og manns-grøvum.

Ringprónur okkara er næst skyldur fimm av teimum fimtan íslendsku prónunum og einum á oynni Eigg vestan fyri Skotland[11]). Serliga líkur er hann tveimum av teimum íslendsku: tí frá Hafurbjarnarstøðum[1]) og nr. 5396 á þjóð-minjasafninum[6]). Báðir eru úr bronsu; hin fyrri 150 mm langur, nálin rund, á høvdinum eru hornini sneidd og valknútur báðumegin. Á hinum seinra er valknútur framm-an; sniðbandið omanfyri klingruna. Nálin er rund í erva, niðast ferstrend.

Íslendsku prónarnir eru allir frá 10 øld*).

Alt ber í tað borð, at teir 5 íslendsku prónarnir og tann føroyski hava uppruna í skotsk-keltiska umhvørvinum; tí at allur dámurin er keltiskur og, sum sagt, hetta prónaslag tykist vera ókent í hinum Norðurlondum men er til í Skot-landi[11]).

*Hesir prónar munnu tí vera gjørdir eftir keltiskari fyri-mynd*[12]) *í norrønu víkingabygdunum har suðuri og haðan komnir til Íslands og Føroya einaferð í 900 árunum.*

Síðan hesin útgrefstur fór fram eru á sama staði komnar undan aðrar smáleivdir av beinum. Tá lendið er so vorðið, at einki er til hindurs fyri, at fleiri gravir eru í oyrini, verður hildið fram við útgrefstrinum til hon øll er rannsakað.

## SUMMARY

Close to the village of *Tjørnuvík*, the northernmost village in *Streymoy*, a grave from the viking period has been unearthed (Fig. 1). This is the first burial find in the Faroes from the viking period.

Figures 2 and 3 show sections through the excavation. The grave is to be found in stratum B, the then surface of the ground.

Figure 4 shows a plan of the grave.

---

*) *Kristján Eldjárn, þjóðminjavørður,* hevur sagt frá hesum í brævi, Honum takka vit fyri vælvildarhjálp.

The grave is surrounded by a rectangular stone frame, about 150×50 cm. The bottom of the grave is situated 8.50–8.70 m above the level of the sea.

*Contents of the grave*: 1) Much crumbled remains of bones: cranium (Fig. 5), right femur, fragments of left femur, right tibia, one of the fibulas, and fragments of bones of the foot. – The skeletal remains have belonged to a woman 155 cm high. The set of teeth complete, apart from 8 +. The teeth are sound, with much wear and tear of the masticating surfaces. – The body was placed with head directed ENE, resting on left side. – 2) A ring-headed pin of bronze, with appendant pieces of cloth (Fig. 6). To the bottom bend of the ring a thread is fixed (Fig. 8). The ring-headed pin is of scottish-celtic type and the burial-find is dated to 10th century.

## BÓKMENTIR


1. Árbók hins íslenzka fornleifafélags 1943–1948, bls. 108–22.
2. *Brøgger, A. W*: Den norske bosetningen på Shetland–Orknøyene. Oslo 1930, bls. 246.
3. *Brøgger, A. W.*: Gamle Emigranter. Oslo 1928.
4. *Brøndsted, Johs.*: Danmarks Oldtid III. København 1940, bls. 310.
5. *Dahl, Sverri*: Tvey fornminni í Syðrugøtu. Fróðskaparrit 1. bók. Tórshavn 1952, bls. 149 f.
6. *Eldjárn, Kristján*: Kuml og haugfé úr heiðnum sið á Íslandi. Reykjavík 1956, bls. 207 og 319 f; 139., 140. mynd.
7. *Nørlund, Poul*: Trelleborg. København 1948, bls. 105 f.
8. *Petersen, Jan*: Vikingetidens Smykker. Stavanger 1928, bls. 172–197.
9. *Shetelig, Haakon*: Gravskikk og religion i norrøne vikingebygder. Viking, bd. X. Oslo 1946, bls. 165.
10. *Shetelig, Haakon*: Vestlandske graver fra jernalderen. Bergen 1912. bls. 201 f.
11. Viking antiquities in Great Britain and Ireland, part II. Oslo 1940, bls. 167; 83. mynd.
12. Viking antiquities in Great Britain and Ireland, part VI. Oslo 1954, bls. 98.